# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Føroyska miðlaflaggskipið í Álandi

Oyggjaleikirnir eru nú aftur á skránni. 25 størri og smærri oyggjar og oyggjalond dystast alla vikuna í Álandi. Føroyar teljast millum hesar oyggjar. Og tað eru vit errin av. Hetta óføra tiltakið at savna ítróttarfólk úr ymsum fjølbroyttum oyggjasamfeløgum er einki minni enn ein gimsteinur. Her er ikki bert talan um at møtast í dysti. Tað snýr seg eisini um at fáa oyggjafólk at kenna samanhald, fólk, sum hava tað til felags at hava oyggjarøtur.

Føroyar hava verið við í leikunum frá byrjan. Hetta eru 13. leikirnir. Vit luttaka við nógvum ungum ítróttarfólkum í fleiri greinum frá einmansleiki til liðkapping. Vit kunnu bara vera errin av okkara fólkum, sum hava vant leingi til hesar serstøku leikir. At vinna í oyggjaleikum er nakað heilt serligt fyri okkara ungu ítróttarfólk. Her dystast tey móti øðrum oyggjabúgvum, og tað kenst sum nakað heilt serligt. Vit líkasum kenna hvør annan út frá tí felags samleika vit eiga sum oyggjabúgvar.

Føroysku miðlarnir hava alstóran týdning fyri leikirnar. Hóast mong í Føroyum ikki hava stórvegis áhuga fyri ítrótti, so er hetta nakað serligt, og tí er eingin ivi um, at mong útvarpslurt standa frá alla vikuna. Tær ymsu ítróttargreinarnar eiga pláss í mongum hjørtum, eisini hjá teimum, ið ikki eru virkin men sum hava eitthvørt tilknýti til ítróttargreinina ella persónarnar, sum umboða hana. Hesin áhugi merkist kanska best, har ávís pláss í landinum kenna tað sum sum júst tey eiga ta og ta ítróttarliðið.

Eisini Miðlahúsið roynir sítt besta til hesar leikirnar. Við okkkara mongu miðlum hava vit fyri fyrstu ferð gjørt eina djarva roynd: at fara av landinum við 8 fólkum til at varpa út á Rásini, at skriva greinar í Sosialinum og at leggja út aktuelt tilfar, myndir og kykmyndir á Portalinum hjá Føroya Tele.

Við tí stóru manning og tí breiða dekningi, sum Miðlahúsið vartar upp við til oyggjaleikirnar í Álandi halda vit gott, at vit kunnu loyva okkum at siga, at vit eru sjálvt miðlaflaggskipið til hetta stóra tiltakið. Nú eru leikirnir júst byrjaðir, so vit skulu heldur ikki longu nú koma við nøkrum dómi um okkara prestatiónir og tær hjá okkara kappingarneytum. Vit halda tað vera stunt og gott við kapping, og tað er ikki ov nógv sagt, at Rás2 í Miðlahúshøpi hevur víst sínar avgjørdu dygdir. Henda rásin er komin fyri at verða. At tann kendasti og besti frásøgumaðurin í føroyskari útvarpssøgu, Jógvan Arge er við á brúnni ger hetta ikki minni spennandi. Saman við Hilmar Jan Hansen, sum eisini er millum kendastu og frægastu útvarpsrøddir í landinum, gleðir restin av oyggjaleikaliðnum við Jákup Mørk og Eyðun Klakstein við stýrisvøl seg til eina góða oyggjaleikaviku. Vit her í Miðlahúsinum fara at ynskja føroysku luttakarunum á leikunum góða eydnu og vit senda hervið eisini okkara bestu heilsanir til manningina á miðlaflaggskipinum til oyggjarleikirnar. Gott í tykkum – gerið leikirnar til eina fólksliga uppliving.

**Sosialurin**

## Tiðnað ríkisveiting og nýggj kommunal byrjan



JASPUR VANG
Løgtingsmaður

**Tiðnaða ríkisveitingin eigur at verða markað til at taka toppin av kommunuskuldini. Tá verður lættari og rættvísari at leggja kommunurnar saman**

Tá ríkisveitingin, við virknaði frá 2002 at roknað, við lóg varð skerd við 366 mió. kr., varð samstundis, og eftir ynski frá einum meiriluta á Føroya Løgtingi, avtalað at fastfrysta tað, sum er eftir av ríkisveitingini. Missurin fyri føroyska landskassan bara av fastfrystingini, hevur seinastu 6 árini verið uml. 110 mió. kr.

Føroya Landsstýri eigur tí til heystar at fara undir tingingar við ríkismyndugleikarnir um at tiðnað upp aftur fastfrystu ríkisveitingina. Tiðnaða upphæddin eigur at verða markað til at taka toppin av kommunuskuldini. Umframt at skunda undir kommunusamanleggingarnar, hevði hettar, nú landsbúskapurin er í einum aldudali, birt vónir og verið við til at skapt virksemi, vøkstur og trivnað úti um alt landið.

Skotbráið frá nú og til heystar, tá kommunubólkurin, sum er settur av landsstýrinum, er liðugur við sítt arbeiði, samstundis sum samráðingar tá verða aftur við ríkismyndugleikarnar um ríkisveitingina, eigur at verða nýtt til at endurskoða og skerpa eftirlit landsstýrisins við kommununum. Hettar soleiðis, at kommunur ikki aftur koma sær í fíggjarligt óføri.

**Kommunuskuldin ein forðing fyri samanleggingum**

Ein tann størsta forðingin fyri, at føroysku kommunurnar ikki sjálvboðnar leita sær saman í størri eindir er, at ávísar kommunur í landinum eru niðurbundnar av skuld, samstundis sum tær hava eitt munandi hægri kommunuskattaprosent, enn tær kommunur, sum fíggjarliga eru betur fyri. Hettar í sjálvum sær fær sjálvsagt tær betur staddu kommunurnar til at himprast við at leggja saman við skuldartyngdu kommununum. Tað vildi eisini verið órættvíst og at revsa tær kommunur, sum fíggjarliga eru væl fyri, um Løgtingið, uttan at taka toppin av kommunuskuldini, við lóg legði tær saman við mest skuldarbundnu kommununum.

**Samfelagið alt, undantikið kommununurnar, er sanerað**

Meginparturin av kommunuskuldini stavar frá tíðini áðrenn kreppuna fyrst í 1990-unum. Í samband við kreppuna tá, varð landskassaskuldin sanerað og umfíggjað, føroysku bankarnir somuleiðis, eins og meginparturin av føroyska vinnulívinum so ella so varð sanerað. Uttan mun til, hvør orsøkin var til landskassaskuldina, kommunuskuldina, bankakreppuna og vinnulívsskuldina í 1990-unum, er tað hvørki rætt ell rímiligt, at bert kommunurnar enn tann dagin í dag skulu standa eftir við sínari skuld.

**Bleytu virðini og kommunuskuldin**

Vit skulu minnst til, at kommunurnar m.a. taka sær av barnaansingarøkinum, barnaverndar-tænastuni, stórum parti av eldraøkinum og av umstøðunum hjá børnum og lærarum í fólkaskúlanum, umframt at kommunurnar skapa karmar um ítróttarog mentunarlívið kring alt landið. Tí er tað sera umráðandi, at hesi so grundleggjandi bleytu virðini ikki verða forsømd av teirri orsøk, at kommunur í landinum ikki hava fíggjarliga orku til at røkja hesi virðir á nøktandi hátt.

**Einki at missa – øll vinna**

Verður tiðnaða ríkisveitingin nýtt til at loysa kommunurnar úr skuldarhaftinum, verður ikki neyðugt at býta skuldina millum kommunurnar og harvið skapa óneyðuga ónøgd og ósemjur millum kommunurnar í landinum. Heldur ikki verður tá neyðugt at taka pening frá øðrum bólkum í samfelagnum at lata teimum kommunum, sum eru illa fyri fíggjarliga. Sostatt fer eingin at missa nakað við hesari loysnini. Tvørtur ímóti, so gerðast øll vinnarar.

**Bygnaðarbroytingar og vøkstur**

Vit skulu taka toppin av kommunuskuldini, greiða uppgávu- og ábyrgdarbýtið millum landið og kommunurnar, seta í verk eina inntøku- og útreiðslujavning millum kommunurnar, og broyta kommunubygnaðin soleiðis, at vit fáa færri, størri og harvið sterkari kommunalar eindir. Tá skapa vit neyðugan vøkstur og harvið trivnað kring alt landið.

Stutt sagt, tá fáa vit eina nýggja kommunala byrjan – okkum øllum til frama.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.